

# Poul Geert nýggjur sjúkrahússtjóri

**Sámal Petur í Grund setti í gjár Poul Geert Hansen úr Havn sum nýggjan sjúkrahússtjóra á Landssjúkrahúsinum fyri Jóanis Erik Køtlum, sum hevur sagt seg úr starvi**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Eirikur Lindenskov*

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund, setti í gjár Poul Geert Hansen úr Havn sum sjúkrahússtjóra fyri Landssjúkrahúsið.

Poul Geert Hansen er 39 ára gamal og hevur tikið cand. polit. útbúgving á lærda háskúlanum í Keypmannahavn í 1991.

Í lestrartíðini hevur Poul Geert starvast á Danmark Statistik og í Finansministeriet. Eftir lokna útbúging hevur hann starvast sum fíggjarfulltrúi á Landsskúlafyrisitingini og sum leiðari fyri Stuðulsstovnin.

Seinastu fimm árini hevur Poul Geert Hansen starvast hjá Nordist Ministerråd í Keypmannahavn sum ráðgevi innan búskap og fyrisiting v. m.

Poul Geert hevur serligan áhuga fyri leiðslu og hevur eisini tikið eina tvey ára masterútbúgving innan almenna leiðslu (MPA)

Poul Geert Hansen tekur við starvinum 1. mai komandi.

## Tøkk

*Í samband við at vit góvust at handli okkara, leygardagin 19. januar, takka vit arbeiðsfólki og viðskiftafólki okkara fyri gott samstarv hesi 34 árini og ynskja tykkum eitt gott nýggjár og Harrans signing í framtíðini.*

***Pf. Hornabúðin***
***Gustav Samuelsen***

# Føroysk og útlendsk servitan hond í hond



*Í hesum nýggja felagnum hava vit samansjóðað í felagnum, er partvís føroysk vitan um framleiðslu innan fiskivinnuna og útlendska servitan um biotøkni, og tað halda vit er ein stór styrki, tí talan er um eina spildurnýggja vinnu í Føroyum, sigur Egil Olsen*

**Egil Olsen heldur at tað er ein stórur fyrimunir at hava fingið útlendingar upp í ætlanina at fara undir biotøkniliga vinnu í Føroyum**

SAMSTARV UM LANDAMØRK
*Áki Bertholdsen*

Tað eru bæði føroyingar og útlendingar, sum eru saman um nýggja felagið, Faroe Marine Biotech, sum greitt er frá í greinini »Startskotið til eina nýggja vinnu í Føroyum« aðrastaðni í blaðnum.

Umframt Egil Olsen sjálvan, eru hinir føroyingarnir í felagnum, Adrian Dalsá fiskivinnufrøðingur í Saltangará, sum er stjóri á Kósini í Klaksvík, Dánjal á Argjaboða, apotekari, sum býr í Danmark og sum hevur fingist nógv við biotøkniskar spurningar í fleiri ár og hevur drúgvar arbeiðsroyndir bæði í Danmark, Føroyum og úti í heimi. Umframt hesar, eigur partafelagið Sesam á Tvøroyri 20% av partapeninginum í Faroe Marine Biotech.

Sesam er eitt felag, ið hevur til endamáls at veita tænastur og at eiga í øðrum feløgum. Fyrst í hesum árinum stovnaði Sesam saman við íslendingum, felagið SecaNor, sum hevur heimstað á Ólafsfjørðinum í Ìslandi. Sesam eigur 33% av partapeninginum í hesum felag. SecaNor skal virka klippfisk úr saltfiski til m.a. brasilianska og dominikanska marknaðin, og ætlanin er eisini at keypa saltfisk úr toski, upsa, longu og brosmu úr Føroyum til endamálið.

Sesam, er eitt felag ið Egil Olsen, umframt Marner Lisberg, Magnus Jespersen og Ólavur Bjarkhamar, allir á Tvøroyri, eiga, og er eitt felag í Delta samtakinum. Felagið eigur m.a. 75% av partapengunum í línuskipinum Hoyvíkingi. Delta samtakið umfatar annars feløgini Delta Seafood, Sandoy Seafood, Sesam og Hoyvíking. Delta Seafood er harumframt eisini størsti einstaki partaeigari í djúpvatnstrolaranum Suðringi.

Útlendsku partaeigararnir í biotøkniska felagnum Faroe Marine Biotech, er Lýsi HF. í Íslandi og Maritex A/S í Noregi.

Partapeningurin í Faroe Marine Biotech er 500.000 krónur. Tað hevur heimstað á Tvøroyri, men hevur fyribils leigað sær skrivstovuhøli í húsunum hjá Arbeiðara-felagnum Hæddini í Runavík.

Helvtin av partapeninginum er føroyskur og helvtin er útlendskur.

### Útlendsk servitan

Egil Olsen sær ein stóran fyrimun í at hava útlendskar samstarvsfelagar við í felagnum.

Maritex er eitt felag, sum ger hávirkaðar vørur úr slógvi frá fiski og alivinnuni, eitt nú ensymur, proteinkonsentratir, DNA saltir og hávirkað lýsi. Hetta eru vørur, sum verða brúktar til nógv ymisk endamál, eitt nú í matvøruídnaðinum, sum »functional foods« og í kosmetikkídnaðinum.

Felagið hevur fleiri granskarar í starvi og brúkar árliga eini 10% av umsetninginum til gransking.

Størsti partaeigarin í Maritex er »Århus Olie« í Danmark, sum er ein fyritøka við fleiri milliardum í umsetningi. Partapeningurin í Maritex er uml. 85 mill kr.

Lýsi er eitt felag sum heldur til í Reykjavík, og sum burturav hávirkar lýsi burturúr fiskalivur, at brúka m.a. í heilivágsídnaðinum, matvøruídnaðinum og til annan ídnað.

Hann sigur, at báðar fyritøkurnar eru millum tær fremstu í Evropa á sínum øki og tí heldur hann, at tað er ein stórur vinningur at hava fingið tær upp í ætlanina.

Orsøkin til, at vit hava fingið hesar báðar fyritøkurnar uppí ætlanina, er, at vit mugu viðurkenna, at skulu vit byggja eina biotøkniska vinnu upp í Føroyum, er tað neyðugt hjá okkum at útvega okkum servitan á økinum.

Og hetta eru tvey virki, sum bæði hava vælútbúgvin og serkøn fólk á økinum og vælútgjørdar kanningarstovur.

– Tað, vit sostatt hava samansjóðað í felagnum, er partvís føroysk vitan um framleiðslu innan fiskivinnuna og útlendska servitan um biotøkni, og tað halda vit er ein stór styrki, sigur Egil Olsen.

Nevndin í Faroe Marine Biotech er mannað við Geir Wilhelm Wold úr Noregi, ið er formaður og umboðar Maritex, Katryn Petursdóttir, úr Íslandi, ið umboðar Lýsi, Ólavur Bjarkhamar, ið umboðar Sesam, umframt Adrian Dalsá og Dánjal á Argjaboða.

Tey, ið vilja vita meiri um útlendsku íleggjararnar í felagnum, kunnu fara á alnetið undir www.lysi.is og undir www.maritex.com



# Blokadan stendur við



*- Mentamálastýrið samskiftir enn við Kommunusamskipan Føroya fyri at finna loysnir, men hevur hetta higartil ikki givið nakað úrslit, sigur Óli Holm, landsstýrismaður við mentamálum*

**- Skrivligu royndir fólkaskúlans eru ásettar at verða í mai, og tað er mín ábyrgd og skylda at síggja til, at hetta fer fram soleiðis sum longu er ásett, sigur Óli Holm, landsstýrismaður við mentamálum**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Ábyrgdina av, at næmingar í 9. og 10. flokki í fólkaskúlanum sleppa til skrivliga roynd í summar, hevur landsstýrismaðurin við mentamálum, Óli Holm. Men blokadan ímóti allari próvtøkugerð, sum Føroya Lærarafelag setti í verk seint seinasta summar og sum framvegis stendur við, hevur gjørt, at ongar próvtøkuuppgávur eru gjørdar, í øllum førum ikki av føroyskum lærarum. Hinvegin hava næmingarnir í 9. og 10. flokki fingið at vita frá skúlanum, teir ganga á, at fráfaringarroynd fólkaskúlans og víðkaða fráfaringarroynd fólkaskúlans verður í mai sum vanligt. Spurdur, um næmingarnir kortini sleppa til skrivliga roynd og hvørjar próvtøkuuppgávurnar verða, hevur landsstýrismaðurin onga viðmerking. Hann vísir aftur á ábyrgdina hann hevur fyri, at næmingarnir sleppa til roynd.

- Skrivligu royndir fólkaskúlans eru ásettar at verða í tíðarskeiðinum frá 14. mai til 18. mai 2002, og tað er mín ábyrgd og skylda at síggja til, at hetta fer fram soleiðis sum longu er ásett, er viðmerkingin hjá Óla Holm til handan spurningin.

Sambært landsstýrismanninum kann tað ikki hugsast, at Mentamálastýrið útvegar próvtøkuuppgávur uttan fyri landoddarnar.

### Semjan

Málið er fløkt, rættiliga viðkvæmt og ikki minst tørført at loysa.

- Tað er sera harmiligt, at málið er komið so langt, at blokada varð sett í verk, sigur Óli Holm.

Sjálvur knúturin er, hvør skal gjalda fyri røktina av søvnunum á skúlunum kring landið. Ivamálið er íkomið av, at ymsar tulkingar eru av semjuni, sum varð gjørd millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið eftir drúgva verkfallið á vári fyri tveimum árum síðani. Í henni stendur í tí partinum, sum nevnist Uttan fyri avtalu, undir punkt 11 soleiðis: Settur verður arbeiðsbólkur við umboðum fyri Føroya Lærarafelag, skúlamyndugleikarnar og kommunur at orða tilmæli um viðlíkahald av søvnum o.ø. Tilmælið skal vera liðugt 1. juli 2000. Miðað verður ímóti, at hetta verður gjørt við støði í næmingatali, hølum og tímanýtslu.

- Burtursæð frá, at tíðarfreistirnar fyri, nær tilmælið skuldi verða liðugt, eru fluttar, so er tilmælið um viðlíkahald av søvnum liðugt frá Mentamálastýrisins síðu, sigur Óli Holm.

Undir punkt 7 í semjuni stendur: Niðurskurðurin fyri at røkja teldur verður frá 1. august til 31. desember 2000 roknaður soleiðis: Næmingatalið í skúlanum 1. september x 0,015 + talið av teldum í skúlanum 1. september x 0,05. Frá 1. januar 2001 verður lagt afturat: + talið av lærarum x 0,02.

Samráðingarrætturin viðvíkjandi lønarviðurskiftunum hjá lærarum liggur sum kunnugt ikki hjá landsstýrismanninum við mentamálum.

- Mentamálastýrið hevur ikki heimild til at binda landskassan at gjalda fyri samsýning av at viðlíkahalda kommunal søvn, og hevur sambært galdandi lógum og reglum heldur ikki heimild til at áleggja kommununum at gjalda limum Føroya Lærarafelags fyri at viðlíkahalda søvn á kommunalu skúlunum, sigur Óli Holm.

Álit er skrivað um tørvin til niðurskurð víkjandi telduvørðum, og tilmæli sent Fíggjarmálastýrinum, um hvussu stórur partur av savnsrøktini er námsfrøðiligt og hvussu stórur partur er røkt.

- Vísandi til semjuna, er Mentamálastýrið av teirri sannføring, at stýrið hevur viðvíkjandi savnsrøktini og KT-vørðunum uppfylt tað, sum semjan hevur álagt Mentamálastýrinum at gera. Harumframt hevur Mentamálastýrið havt fund við bæði kommunufeløgini í november í fjør, har Føroya Kommunufelag gav til kennar, at tey ikki tóku undir við tilmælinum. Kommunusamskipan Føroya kundi taka undir við tilmælinum, men skuldi henda samsýning gjaldast av teimum, so skuldi pengar fylgja við, sigur Óli Holm.

### Samskifti

Mentamálastýrið samskiftir enn við Kommunusamskipan Føroya fyri at finna loysnir, men hevur hetta higartil ikki givið nakað úrslit. Mentamálastýrið hevur hjá kommunudeildini í Tinganesi spurt seg fyri, um kommunudeildin har kann áleggja kommununum at gjalda sambært tilmælinum um savnsrøkt, men hevur fingið upplýst, at kommunudeildin kann ikki áleggja kommunum nakað, uttan so, at tað fyrst kann staðfestast eitt lógarbrot, í hesum førinum viðvíkjandi søvnunum. Hjá løgfrøðingi í Mentamálastýrinum og eisini hjá Fíggjarmálastýrinum hevur Mentamálastýrið kannað, um Mentamálastýrið kann samráðast við kommunurnar, tvs. Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, um samsýning fyri søvn.

- Niðurstøðan er í báðum førum tann, at skulu samráðingar verða við Lærarafelagið um bindandi avtalur um savnsrøkt, liggur heimildin bara hjá kommununum. Hetta hevur Føroya Lærarafelag eisini fingið at vita frá Mentamálastýrinum, sigur Óli Holm.



SANSIR TEL 355 355

Kall søkir edv-fólk

Kall víðkar um internet-kervið. Í sama viðfangi verður søkt eftir einum evnaríkum og dugnaligum fólki til rakstur og útbygging av servarum og routara-kervinum.

Ert tú ágrýtin, góður at samstarva við og kanst arbeiða sjálvstøðugt, so er tað kanska tær, vit hava brúk fyri. Tú mást vera tolgóður til skjalfesting og hava hugin at læra.

Vit hugsa okkum, at tú hevur eina viðkomandi edv-útbúgving sum til dømis datamatikari. Tað er umráðandi, at tú hevur vitan um IP-kervi og arbeiðsroyndir frá teldukervum við Win NT og Win 2000 servarum.

Vit kunnu bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning í einum virki, ið vil vaksa seg stórt í meldrinum av kunningartøkni.

Stutt sagt skalt tú duga við tólum og fólkum á einum arbeiðsplássi, har tað gongur skjótt fyri seg.

Lønin verður ásett eftir førleika, útbúgving og royndum. Starvið verður sett skjótast til ber.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hin 28. januar 2002. Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til Terja Durhuus, telefon 202071.

Endamálið hjá Kalli er at vera ein føroysk fjarskiftisfyritøka, ið er før fyri at kappast – til gagns fyri brúkaran. Felagið ætlar altíð at veita ta bestu tænastuna og at vera mest nýskapandi á føroyska marknaðinum.

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo

kall
*Orðið er títt*